Starvslýsing



# Starvsfólk til bókhaldið

**Søkt verður eftir starvsfólki til bókhaldið at byrja skjótast tilber. Starvið er fjølbroytt, mennandi og fevnir um øll økir innan bókhald.**

Talan er um eitt starv, har tú fært høvið at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, sum er í støðugari menning, saman við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**
Avgerandi er, at tú hevur áhuga í fyrisitingarligum viðurskiftum og royndir innan bókhald. Tað er umráðandi, at tú er fyrikomandi og hevur hegni og hug at hjálpa til, har tað er neyðugt og tá á stendur.
Vit vænta at tú hevur lokið handilsskúlaprógv ella hevur royndir, ið eru samsvarandi við hesa útbúgving.

**Starvstreytir**
Løn, arbeiðstíð og onnur starvsviðurskifti eru eftir nærri avtalu.

**Umsókn**
Vilt tú vita meir um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Esmar Olsen, fíggjarleiðara á telefon 344012. Umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til eo@formula.fo ella við brævi til

**Formula.fo**
**Att. Esmar Olsen**
**Stiðjagøta 5**
**Postrúm 1078**
**FO-110 Tórshavn**

Vit vóna, at rætti umsøkjarin kann byrja uml. 1. desember 2008.
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 7. november 2008.

Formula.fo er ein KT fyritøka við 70 fólkum í starvi. Vit útvega vørur og tænastur í Føroyum og uttanlands. Í fyrisitingini á Formula.fo arbeiða í dag 5 fólk.

**formula.fo**
Stiðjagøta 5-11 · Tórshavn
Tel 344000 · www.formula.fo

IKON // TEL 320 870

# Skráin fyri Rás 2



## Hósdagur 30. okt.

16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
17:30 Vespureiðrið – Sending um og við fólki frá NSÍ.
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending (e)
21:00 Orð á leiðini – Sending hjá EVR. Jógvan Zachariassen leggur til rættis
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Fríggjadagur 31. okt.

07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsending
10:05 Morgunsending – heldur fram
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending – heldur fram
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttur leggur til rættis. Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartssendingin
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartssendingin
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Fótbóltsveitslan í Miðlahúsinum
00:00 Liðugt

## Leygardagur 1. nov.

07:00 Tónleikur
11:00 Vespureiðrið (e)
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Maggi Gunnarsson er vertur
14:00 Vinnurásin – Jan Müller er vertur
15:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen ella Andrew Djurhuus leggja til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

begga & john



## Bilradio

### – í dag kl. 16.05

Í sendingini verður tosað við hjúnini Beggu og John Justinussen í Havn, sum hava vunnið ein Ford Fiesta.

Eisini verður vitjað hjá Auto Service, har vit hoyra um eitt temakvøld fyri kvinnur og um ljósareyðar bilar.

Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um at Mazda flyta nýggjar bilar úr Japan til Russlands eftir tí kendu Transsibirisku Jarnbreytini.

Sendingin verður endursend fríggjamorgunin kl. 08.05 og leygardagin kl. 13.00

RÁS ...títt radio